Prix Føroyar 2003:

Tónleikarar ónøgdir við broytingarnar

Nógvar umfatandi broytingar hava verið gjørdar til Prix Føroyar kappingina, sum verður komandi ár. Ein av teimum er, at hvør einstakur tónleikari sleppur bert at luttaka í kappingini við einum bólki, og er tað júst henda broytingin fleiri av tónleikarunum eru ónøgdir við

TÓNLEIKUR
Ingrid Bjarnastein

Niels Uni Dam úr MC Hár er ein av tónleikarunum, sum er ónøgdur við tær broytingarnar, ið eru gjørdar til komandi Prix Føroyar kappingina

– Broytingarnar til Prix Føroyar næsta ár eru nógvar, men tann størsti trupulleikin er, at ongin tónleikari sleppur at spæla í meira enn einum bólki, sigur Niels Uni Dam, sum vit kenna frá millum annað MC Hár.

Niels Uni vísir á, at tað eru fleiri tónleikarar, sum eru við í fleiri bólkum, og hann metir ikki, at fyrireikararnir eiga at siga, hvussu nógvum bólkum hvør einstakur kann verða við í.

– Fyrireikararnir siga, at um tú ert við í fleiri bólkum, so ert tú ikki nóg seriøsur, men tað haldi eg er ikki rætt. Tað er ikki trupulleikin hjá teimum, um ein tónleikari velur at spæla við fleiri bólkum ella ikki, heldur Niels Uni.

Hann vísir á, at millum annað kunnu MC Hár ikki verða fullmannaðir, tí onkur av tónleikarunum spælir eisini við í øðrum bólki, og henda trupulleikan vísir tað seg, at fleiri bólkar hava.

Skerja møguleikarnar

Sjálvur heldur Niels Uni, at við teimum nógvu broytingunum, so verða møguleikarnir hjá tónleikarunum skerdir.

– Vit kunnu til dømis taka Mikael Blak, sum var við í meira enn einum bólki seinasta ár. Ongin skal koma og siga mær, at hann ikki er ein seriøsur tónleikari, og hann kom eisini við nøkrum av teimum bestu framførslunum. Hetta skerjir møguleikarnar hjá tónleikarunum, tí fleiri bólkar kunnu als ikki verða við, greiðir Niels Uni frá.

Við hesum er tað tó heldur ikki sagt, at rock-tónleikarin heldur, at tað Prix Føroyar skal skipast júst sum fyrr. Millum annað tekur Niels Uni væl undir við tí, at øll tey innleiðandi umførini eru flutt til Fuglafirðar.

– Tónleikaumstøðurnar hava ikki verið so góðar allastaðni, og eg havi sjálvur spælt undir vánaligum tónleikaumstøðum. Í Fuglafirði eru umstøðurnar góðar, og tí er tað ikki nakað galið við tí, sigur Niels Uni, sum leggur afturat, at tað einasta, sum kanska er eitt sindur óheppið er, at við at flyta øll innleiðandi umførini til Fuglafirðar, so kann tað bremsa tí blómandi tónleikalívinum úti á bygd.

Fyri tó at venda aftur til tað, at tónleikarar bara sleppa at verða við í einum bólki, so sigur Niels Uni, at broytingarnar, sum nú verða tiknar í nýtslu, koma frá teirri tíðini, tá áskoðararnir eisini sluppu at atkvøða um, hvør bólkur slapp við í finaluna.

– Tá komu veruliga nakrir ringir bólkar í finaluna, men broytingarnar kunnu ikki gerast út frá hesum, tí hetta er langt síðani broytt. Um ein persónur er við bara í einum bólki ger hann ikki meira seriøsan um hann spælir í tveimum.

Niels Uni sigur eisini, at tónleikapallurin í Føroyum er so lítil, at hetta ger, at fleiri tónleikarar ganga aftur.

– Nakað annað, sum fyrireikararnir hava sagt er, at hvat nú um ein finala verður bert við somu tónleikarunum? Har vil eg siga: Og hvat so? Um nakrir tónleikarar veruliga eru so góðir, at teir megna at mynda eina finalu, so eru teir nóg góðir.

At enda sigur Niels Uni, at broytingarnar skerja nógv niður.

– Tað ger, at innleiðandi umførini kanska gerast betri, men ikki finlanan!

Tónleikarin má gera eitt val

Fróði Vestergaard, sum er ein av fyriskiparunum fyri Prix Føroyar 2003, er sannførður um, at broytingarnar, ið gjørdar eru, eru tær røttu

TÓNLEIKUR
Ingrid Bjarnastein

Fróði Vestergaard er sannførður um, at broytingarnar, sum eru gjørdar til komandi Prix Føroyar kappingina, eru tær røttu

– Vit hava gjørt hesar broytingarnar av okkara royndum, sigur Fróði Vestergaard.

– Seinastu árini hava fleiri tónleikarar verið við í nógvum bólkum, og hetta hevur ofta við sær, at ongin bólkur er nóg góður.

Fyrireikararnir, sum eru Útvarp Føroya, Sjónvarp Føroya, Norðurlandahúsið og FUT, hava valt at siga, at tónleikararnir skulu bara satsa upp á ein bólk, ístaðin fyri at vera við í fleiri. Hetta skuldi helst hækkað støðið í kappingini.

– Man kundi eisini væl sagt, at ongin sleppur at vera við í meira enn tveimum bólkum, men so koma teir, sum eru við í trimum og boða frá, at hetta dámar teimum ikki. Og um talið varð hækkað til trý, so koma teir, sum eru við í fýra. Spurningurin er bara, hvussu nógvum bólkum skal tað vera loyvi at spæla við í, spyr Fróði Vestergaard.

Hann vísir eisini á, at tað er strævið at verða við í fleiri bólkum.

– Tá ein tónleikari fer inn á pallin í til dømis eina finlau, so gevur hann alt, hvat hann hevur. So hevur hann ikki meira at geva bólki nummar tvey. Vit hava dømir frá hesum. Millum annað Rókur, sum kom við í finaluna bæði við Diatribes og Tangz, hann valdi Tangz framum, tí hann setti seg ikki føran fyri at vera við báðum, greiðir Fróði Vestergaard frá.

Fróði Vestergaard heldur sjálvandi, at tað ber væl til at vera seriøsur í meira enn einum bólki, men so eru tað eisini tónleikarar sum eru meldaðir til í fleiri bólkum, sum als ikki eru seriøsir.

– Prix Føroyar er eitt stórt og kostnaðarmikið tiltak. Vit vilja helst hava tað soleiðis, at vit fáa tónleikarar, sum veruliga eru seriøsir við tí teir gera, og soleiðis geva áskoðarunum eina góða vøru. Tað er ongin grund til at brúka eina so stóra peningaupphædd, um tað ikki var soleiðis. Tú kanst gott verða seriøsur í tveimum bólkum, men kanst tú tað í 10?

Avmarkingar

Fróði Vestergaard sigur, at ein verður noyddur at gera avmarkingar. Soleiðis er tað í øllum tónleikakappingum í londunum rundan um okkum.

– Um ongin avmarking er, so kunnu 10 tónleikarar gera fimm ymsar bólkar, sum allir enda í finaluni – og tað gerst ein keðilig finala! Tað er altíð eitt val, og soleiðis er tað eisini við Prix Føroyum.

Allar kappingar hava avmarkingar, og Fróði metir ikki, at hetta er við til at skerja møguleikarnar hjá tónleikarunum.

– Um Prix Føroyar er einasti møguleikin hjá tónleikarunum at koma fram, so er okkurt galið í landinum. Prix Føroyar skal ikki brúkast sum ein sovi-púta. Hetta er ein finur møguleiki hjá bólkum at gera vart við seg. Bæði hjá etableraðum bólkum og nýggjum bólkum, sigur Fróði Vestergard.

– Hetta er heldur ein eyka møguleiki, sum tónleikararnir fáa. Prix Føroyar má ikki stýra tí føroyska tónleikalívinum. Tað er heldur við til at seta tónleikin í fokus í nakrar mánaðar.

Framvegis ósemja

Ein fyrispurningur í Løgtinginum vísti, at stór ósemja framvegis valdar um navnalóggávuna

NAVNALÓGIN
Heri á Rógvi

Eftir nógv rok í seinastu tingsetu vendi navnalóggáva aftur til Føroya Løgting mikudagin. Málið um endurskoðan av navnalóggávuni fekk eina mærghættliga vend í seinastu tingsetu, tá partar av rættarnevndina av sínum eintingum settu egið uppskot fram fyri tingi, eftir at landsstýrismaðurin, Høgni Hoydal, hevði tikið sítt uppskot aftur.

Løgtingið samtyki eina broyting í navnalóggávuni, t.e. løgtinslóg nr. 41 frá 26. mars 2002.

Í henni finna vit hesa orðingina:

Stk. 4. Navnanevndin kann eftir umsókn gera undantak frá stk. 2, tá ið uppkallað verður eftir fólki í ættini. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um undantøk.

Høgni Hoydal hevur seinni gjørt hesa kunngerð, og hon er at finna í heilum líki aðrastaðni á síðuni.

Tað er hesa kunngerð, ið Jógvan á Lakjuni, tingmaður fyri Fólkaflokkin, heldur verið skeiva í mun til lógina, og hann setti tí fram fylgjandi fyrispurning:

1. Nær fer landsstýrismaðurin at broyta kunngerðina um uppkalling, so hon lýsir hugtakið, »í ættini« eftir vilja Løgtingsins og samsvarandi føroyskari mentan?

2. Hvørji málvísindalig fyrilit nýtir navnanevndin, tá ið hon avger, hvørji nøvn koma á tann góðkenda navnalistan? Hví eru t.d. mannfólkanøvnini, Olaf og Oluf ikki á listanum, tá ið konufólkanavnið, Oluffa, er?

Høgni Hoydal vísti í síni svari á, at hann onkar ætlanir hevur um at broyta verandi kunngerð. Hann helt tað vera sera trupult at umsita var orðaljóðið øðrvísi, og Høgni Hoydal vísst eisini á, at tað ikki vóru nakrar viðmerkingar í lógina, sum greitt vístu, at mann vildi hava orðaljóðið øðrvísi.

– Samanumtikið kann sigast, at kunngerðin er gjørd soleiðis, at gjørligt verður at umsita lógina sambært meginregluni og teimum endamálum, sum lógin um fólkanøvn er bygd á. Sum øll viðgerðin í Løgtinginum og í rættarnevndini, sum leiddi til núgaldandi lóg, vísti á, so er neyðugt, at lógin kann umsitast eftir so greiðum reglum sum gjørligt. Hetta til tess at rættartrygdin hjá borgarunum gerst betri, segði Høgni Hoydal millum annað í sínum svari.

– Verður undantakið strekt enn longur út í ættina, og kravið í kunngerðini um beinleiðis uppkalling slept soleiðis, at loyvi verður givið til at uppkalla upp á tvørs av kynum, eins og í dømi 3 hjá spyrjaranum, ber ikki longur til á greiðan hátt at kanna eftir, um tað snýr seg um uppkalling. Avleiðingin hevði verið, at nærum ongin regulering var eftir á økinum, og tá vildi undantak blivið meginregla, og kunngerðin hevði eisini ligið uttan fyri heimildarásetingina, tá henda má haldast saman við meginregluni í lógini.

Jógvan á Lakjuni setti í tinginum Høgna Hoydal skrivliga fyrispurning um navnalóggávuna. Sjálvur vildi hann havt aðar ásetingar galdandi á økinum

Landsstýrismaðurin metir seg tí hvørki hava avmarkað ella broytt lógina, eins og spyrjarin tekur til, men hinvegin at hava ásett lógarheimiláðar reglur um undantak, sum kunnu umsitast á ein skilagóðan hátt – uttan at farið verður út um heimildarásetingina í lógini, sigur Høgni Hoydal. Svarið til seinna partin av fyrispurninginum var heldur meira ógreitt, tí torført var at fáa greiðu á støðuni hjá øllum málfrøðingum, sum tað varð vístí skrivi frá málnevndini.

Jógvan á Lakjuni segði eftir at fyrispurningurin varð svaraður í tinginum, at hann helt, at orðaskiftið hevði lýst málið rímiliga væl.

– Tað vísir seg, at hetta málið liggur nógvum fólkum sera nær. Eftir mínum tykki skuldi tað verið loyvt at kalla upp á annan hátt, enn tað stendur í kunngerðini, sigur Jógvan á Lakjuni. Hann vil ikki gera málið til eitt samgongumál. Hann metir heldur, at talan er um eitt alment mál, har nógv sjónarmið eru. Sjálvur er Jógvan á Lakjuni ikki í iva um, at hann lógin eigur at verða gjørd meira frísinnað.

Tað er tó ógreitt, hvørja fylgjur orðaskiftið í sambandi við fyrispurning fær.

Sum er skulu børn hava føroysk nøvn, sum eru at finna á føroyska navnalistanum. Er talan um beinleiðis uppkalling ber til at víkja partvíst frá hesum

Eiga at taka onnur fyrilit

– Tað átti ikki at verið so strangt, hvørji nøvn verða loyvd á navnalistanum, sigur Eivind Weyhe, málfrøðingur

NAVNALÒGIN
Heri á Rógvi

– Navnalóggávan er ov strong.

Hetta metir Eivind Weyhe, málfrøðingur. Tá navnalóggáva varð evnað til í 1992 sendi hann rættarnevndini hjá Løgtinginum eitt bræv, har hann vísti á sín áhuga at gera viðmerkingar til tað ætlaðu lógina. Hansara sjónarmið komu tó ongantíð at hava tað nógv at siga. Lógin varð skrivað í einum sovorðnum líki, ið Eivind Weyhe ikki er samdur í.

– Meira liberal málslig sjónarmið áttu eisini at verið tikin við. Tað átti ikki at verið so strangt, hvørji nøvn verða loyvd á navnalistanum, sigur Eivind.

Fyri Eivind Weyhe at síggja er tað ein spurningur um, hvussu tú definerar tað at vera í samsvar við føroyskar málreglur. Hann nevnir eitt nú dømi um nøvn, sum hava verið vanlig í Føroyum í nógv ár, men nú sleppa hesi ikki upp í part longur.

– Lógin varð gjørd alt ov avmarkað frá byrjan. Teir trupulleikar, vit nú síggja, vóru væntandi við einari tílíkari lóg við stórum avmarkingum, sigur Eivind Weyhe.

Hann vil ikki siga, at tað var skeivt at seta eina sovorðna lóg í gildi, men hann heldur, at linjan í lógina er alt ov avmarkað, og tað vísir seg eisini, at sera nógv fólk eru ónøgd við lógina.

Eyvind Weyhe hevur sjálvur ikki tikið støðu til, hvørt tað – eftir hansara tykki – skal vera fullkomiliga frítt hjá fólki at kalla teirra børn fyri, hvat tey vilja, men heldur, at lógin átti at verið meiri liberal, enn hon er.

Líkamikið hvat hendir við navnalóggávuni, so er Eivind ikki í iva um, at málið verður tað sama – hvørki betri ella verri.

KUNNGERÐIN

Nr. 71

29. juni 2002

Við heimild í § 2, stk. 4 í løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn verður ásett:

§ 1. Er navn ikki í samsvari við § 2, stk. 2 í lógini, kann navnanevndin eftir umsókn í sambandi við navnagávu kortini loyva navnið, tá ið tað er beinleiðis uppkalling eftir foreldrum, ommum ella abbum barnsins. Navnanevndin kann eisini í serligum føri gera undantak til uppkalling av systkjum hjá barni ella systkjum hjá foreldrum, ið lata lív undir óvanligum umstøðum.

§ 2. Umsókn um undantaksloyvi til uppkalling, sum nevnt í § 1, skal verða send navnanevndini skrivliga.

Stk. 2. Umsøkjarin skal veita navnanevndini skjalprógv um navnið á viðkomandi ættarfólki og sambandi tess við barnið.

§ 3. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmálaráðið, 28. juni 2002

Høgni Hoydal, (sign.)
landsstýrismaður

/Rúni Joensen